# NÝGGJÁRSBÁL

## Umsókn um at brenna nýggjársbál

Sambært kunngerð um burturkast nr. 147 frá 19. oktober 1995 er krav, at góðkenning skal fáast frá kommununi at brenna nýggjársbál. Søkjast kann um loyvi á Sløkkiliðsstøðini á telefon 302100 innan 31. desember 2010, klokkan 12.00.

**Treytirnar fyri at fáa loyvi eru hesar:**

- at bert reinur, óviðgjørdur og turrur viður verður nýttur
- at støddin á bálinum er í mesta lagi 3 metrar í diametur og 2 metrar í hædd
- at bál, størri enn 3 metrar í diametur og/ella 2 metrar í hædd, skulu frammanundan góðkennast av Sløkkiliðnum við sýn á staðnum og verða bert loyvd, um Sløkkiliðið metir trygd og frástøðu at verða hóskandi til umstøðurnar
- at veðrið er til vildar, og vindferðin skal í mesta lagi verða 15 m/s
- at frástøða til hús og lutir verður nóg stór
- at navnsnevndur ábyrgdarpersónur er á staðnum
- at navn, adressa og telefonnummar verða upplýst Sløkkiliðsstøðini, telefon 302100.
- at um neyðugt verður hjá Sløkkiliðnum at fara á staðið at sløkkja ella rudda, er tað navngivni ábyrgdarpersónurin, ið fær rokning.
- at økið verður ruddað í seinasta lagi dagin eftir
- mælt verður til, at hava spannir ella vatnkør á staðnum til sløkking ella køling í samband við møguligar brunaskaðar

Hesar treytir skulu tryggja, at bálbrenningin verður gjørd við skynsemi, umframt at minst møgulig umhvørvisárin standast av brenningini.

---